**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Deildarleiðari

## til ta ambulantu økispsykiatrisku deildina

Starvið sum deildarleiðari á tí ambulantu økispsykiatrisku deildini á psykiatriska deplinum er leyst at søkja til setan 1. oktober 2004 ella eftir avtalu.

Talan er um eitt nýtt starv, og deildin er fyrsta stigið í samband við ígongdsetan av økispsykiatri í Føroyum. Deidarleiðarin kemur í tøttum tvørfakligum samstarvi at upp- og útbyggja deildina.

Ambulanta deildin verður miðdepil fyri nýggjum ambulantum og økispsykiatriskum virksemi.
Deildarleiðarin kemur at byggja upp og samskipa tey ymisku toymini á deildini, sum umfram t økispsykiatri kemur at umfata geronto- barna- og ungdómspsykiatri. Eisini kemur deildin at rúma øðrum ambulantum viðgerðartilboðum, eftirviðgerð av áður innlagdum sjúklingum og hava um hendi sjúkukunning (psykoedukatión) og kunnandi virksemi til avvarðandi.

Deildarleiðarin hevur við tilvísing til leiðandi sjúkrarøktarfrøðinginum á psyk.deplinum ábyrgdina av sjúkrarøktini, fíggjarrakstrinum, starvsfólkaleiðslu og menning av deildini og samstarvinum innanhýsis og úteftir.

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- prógv og royndir innan leiðslu, psykiatriska eftirútbúgving ella líknandi. Sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava ætlanir um víðariútbúgving, kunnu eisini søkja
- hollar royndir og fakligan áhuga innan psykiatri
- hava ætlanir um frálæru og menning av starvsfólkunum
- góð samstarvsevni
- skal vera sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og hava visiónir
- teldukunnleika á brúkarastøði

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- nógvar nýggjar avbjóðingar
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjar-málaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri fæst at vita um starvið við at ringja telefon 304500 til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktar-frøðing, lokal 4102 - e-postur bergitw@lsh.fo

Umsóknarfreistin er mánadagin 27. august 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um starv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Bókhaldari søkist

til at arbeiða 1/2 tíð, at byrja skjótast gjørligt.

**Áhugað ringið á tlf. 503903**

# Njóti Festivaldøgurða á Hotel Norð saman við Brandi Enni

Í samband við summarfestivalin hevur Hotel Norð sunnudagsdøgurða, 15. august
har Brandur Enni undirheldur við tónleiki

**Matskráðin er hendan:**

*Forrættur:*
Rómalagera Aspargessúpan við Flutes

*Høvuðsrættur:*
Heilstókt lambstjógv v/hvítleyks sauté,
grønmeti og lambssós

*Omaná:*
Stór kakubuffet við kaffi og te

Kaka v/ kaffi og te er at fáa allan sunnudagin

Bílegg borð á telefon 45 12 44

**Hotel Norð**



Tel 451244 Fax 451245 FO 750 Viðareiði



**MAZDA 626 GLX 2.0 TD**
**HATCHBACK**

Árg. 10/1998 Km. 148000
Litur: Myrkt grønur
Fjarstýrt centrallás
El-rútar aftan og framan,
El-spegl, Air con.
Píkadekk á felgum fylgja við

**Tlf. 373 985**
*Prísin kunnu vit tosa um*

Sosialurin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2296, P/F Aluplast, 512 Norðragøta.
Viðtøkur broyttar: 19.07.2004.
Kapitalur: Lækking við kr. 375.000,00 til kr. 125.000,00 til rindan av halli.
Hækking við kr. 875.000,00 til kr. 1.000.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 875.000,00 til kurs 114,285
Partabrøv: A: partabrøv kr. 125.000,00 og B: partabrøv kr. 875.000,00
Nevnd:
Innkomin í nevndina: Poul Andrias Jacobsen, 512 Norðragøta og Kaj Hansen, 700 Klaksvík.
Tekningarreglur:
Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum ella nevndarformanninum ella 3 nevndarlimum.
Grannskoðari:
Farin frá sum grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannskoðari: Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.

Skráseting Føroya tann 9. august 2004

Kristin Balle

Sosialurin í Sosialurin



RESTAURANT
MARCO POLO

# Starvsfólk søkist

Hervið verður søkt eftir starvsfólki til matstovu okkara, tað er ein fyrimunur um tú hevur góðar royndir innan yrkið.

Meira fæst at vita á tel 21 34 30

RESTAURANT
MARCO POLO
100 TÓRSHAVN · TEL 31 34 30
WWW.MARCOPOLO.FO




# Til sølu

## Ford Focus Station

**1.8 Turbo Diesel**
**Í sera góðum standi**
**Árg. 1999**
**Koyrt 96.000**
**Kr. 125.000,-**
**Útgjald bert kr. 25.000,-**
***Restina práta vit um***

**Bilfríðkan**
*Velbastaðvegur • 110-Tórshavn*
*Tel. 31 73 00 ella 21 73 00*
FIAT

Sosialurin
-tað loysir seg

Summar '04
# FESTIVALUR
## Ferðslan á Summarfestivalinum




**Broytingar í ferðsluni í Klaksvík**
Í sambandi við Summar Festivalin verða hesar broytingar gjørdar í ferðsluni í Klaksvík frá fríggjadegnum 13. august kl. 18.00 til mánadagin 16. august kl. 06.00.

**Broytingar:**
- Biskupsstøðgøta verður stongd frá Norðoya Sparikassa til rundkoyringina á Posthúshorninum.
- Vegurin Við Sandin verður stongdur frá Klaksvíksvegnum til Biskupsstøðgøtu.
- Eingin gjøgnumkoyring verður eftir Ósavegnum, men koyrandi verður frá Skulavegnum og oman til Ósavegin.
- Koyrandi verður báðar vegir eftir Skúlavegi - millum skúlanar - til og frá Gerðagøtu.

**Klaksvíkar kommuna**